gult12 cyan12 magenta12 svart12



Løgmaður:

# Kortanei til proklamatiónspolitikk

**-Eg vil hava realitetspolitikk og ikki ein proklamatiónspolitikk, tí tað er einki land í verðini, sum er vorðið sjálvstøðugt uttan so, at tað hevur fingið góðkenning frá tí, sum tað hevur verið saman við. At fara út í ein proklamatiónspolitikk mótvegis dønum trúgvi eg ikki førir okkum nærri einum sjálvstøðugum Føroyum sigur løgmaður í viðmerking til úttalilsi hjá Tórbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismanni**

TRUMFKORT
*Jan Müller*

-Tað er breið semja millum allar politikarar í Føroyum, at vit eru ein tjóð. Um nakar heldur, at alt er loyst og liðugt í sjálvstýrismálinum við at reka proklamatiónspolitikk, við eitt nú at senda fráboðan til ST um, at vit eru serstøk tjóð við sjálvsavgerðarrætti, so fer hann skeivur sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður í eini viðmerking til atfinningarnar frá fyrrverandi landsstýrismanninum, Tórbjørn Jacobsen í Fregnir.

Tórbjørn Jacobsen sigur í samrøðu við blaðið, at løgmaður eigur at senda umrøddu fráboðan til ST og leggur aftrat, at tað sjálvandi fer at elva til stríð, tí tað gongur ímóti danska føroyapolitikkinum. –Tað er neyðugt at taka hetta stríðið. Verður ikki staðfest hjá altjóða stovnum, at føroyingar eru ein tjóð, fara vit aldrin at vinna tey rættindi, sum hoyra eini tjóð til. Vit mugu tora at hevda okkara rætt segði hann við blaðið.

Løgmaður er ikki samdur við honum. Hann sigur: -Tú hevur nøkur rættindi. Tey skal tú verja. Men tað, sum ræður um í míni verð, er, hvussu tú spælir best við hesum kortinum (fráboðanini til ST, blaðm.) fyri at røkka tí setningi, sum landsstýrið hevur sett sær. Og tað er ikki bara at proklamera og einki meira. Um tað er proklamatiónspolitikkur, sum man vil hava, so er tað sjálvandi tann mátin tað skal gerast uppá sigur løgmaður og sipar til úttalilsini hjá Tórbjørn Jacobsen.



Løgmaður er ikki samdur við fyrrverandi landsstýrismannin Tórbjørn Jacobsen.

-Eg vil hava ein realitetspolitikk, tí tað er einki land í verðini, sum er vorðið sjálvstøðugt uttan so at tað hevur fingið góðkenning frá tí, sum tað hevur verið saman við. At fara út í ein proklamatiónspolitikk mótvegis dønum trúgvi eg ikki førir okkum nærri einum sjálvstøðugum Føroyum. Løgmaður sigur annars, at vit kunnu senda umrøddu fráboðan til ST nær tað skal vera, men hann dugir ikki at síggja, hvat vit fáa burtur úr við at gera tað nú.

-Tað eg havi sagt í samgonguni um fráboðanina til ST er, at tað er eitt kort, sum vit skulu brúka mótvegis donsku stjórnini. Tvs. at alt eftir hvussu støðan gerst í samráðingunum við donsku stjórnina, skal man brúka tað kortið. Hevur tú koyrt hetta kortið yvir borðið, so kanst tú ikki brúka tað meira. Tað er tí eg havi hildið tí aftur. Eg vil fegin kunna koma aftur til borðið at tosa við donsku stjórnina um hesi viðurskiftini. Tað nyttar einki at spæla sær allar trumfarnar av hondini, áðrenn tú er komin hálva leið í spælinum sigur løgmaður og leggur aftrat, at hetta er ein stórur trumfur, ja kanska tann størsti vit hava.

At fólkaatkvøðan – sum Tórbjørn Jacobsen leggur upp til í Fregnum - varð avlýst eftir trýsti frá Óla Breckmann er heldur ikki rætt vísir løgmaður á. -Tað var ein reint persónlig meting hjá mær sjálvum. Hevði tann fólkaatkvøðan verið og úrslitið var eitt nei, og vit ganga út frá tí tulking, sum forsætisráðharrin hevur, so hevði tað verið ein innliman í danska ríkið fyri Føroyar, og tað hevði verið ein vanlukka.

Løgmaður heldur tað heldur ikki vera rætt at royna at elva til eitt stríð við danir. -Tað er ikki bara at busa avstað. Tað skal verða gjørt á rættan hátt og væl forankrað. Fólkaflokkurin stendur eisini fult samdur í sjálvstýrismálinum og tað, sum samgongan stendur saman um, er í fult í tráð við tað, sum Fólkaflokkurin stendur fyri. Eg skilji á Tórbjørn Jacobsen, at vit við at senda brævið til ST fáa eitt øgiligt rok. Hvat skal tað rokið brúkast til. Vit hava møguleika til at fremja ta ætlan, sum er umfatað av Heimastýrislógini, sum er. Vit hava tilsagnir, skrivligar og munnligar, at tað er Føroya fólk, sum tekur hesa avgerðina. Men tað er eingin loyna, at danska politiska skipanin øll sum hon er ynskir, at vit halda fram í ríkinum. Tað, sum nú ræður um hjá okkum, er at brúka teir møguleikar, sum liggja. Og tað tekur eitt sindur longri tíð.

# Búskapargrunnur á tingborð eftir ólavsøku

**-Vit høvdu hann á borðinum og ætlaðu at koyra hann niðan, áðrenn tingið fór til hús, men vit høvdu ikki fingið ta neyðugu politisku viðgerðina frá hondini. Lógin um búskapargrunnin kemur í tingið eftir ólavsøku sigur løgmaður og vísir annars á, at hann er ikki partur av samráðingunum við donsku stjórnina**

BÚSKAPARGRUNNUR
*Jan Müller*

Nú ivi er sáddur um, hvussu verður við tí sjálvstýrispakkanum, sum samgongan samtykti herfyri biðjur løgmaður Føroya fólk sissast. Hann viðgongur, at tað verða nøkur viðurskifti, sum man ikki fær forstáilsi fyri og viðspæl frá donsku stjórnini. Mál, sum vit ætla og halda eru náttúrlig at yvirtaka, men sum eftir tí danska stjórnin leggur upp til, mugu bíða til vit taka suverenitetin. Tvs. at tað verður meira í suverenitetspakkanum og minni í yvirtøkurprosessini enn tað vit hava lagt upp til sigur løgmaður og vísir samtíðis til, at tað vil man frá føroyskari síðu so eisini fyrihalda seg til. Og tað er heldur ikki ógjørligt leggur hann aftrat.

-Tað, sum er avgerandi, og tað hevur danski forsætisráðharrin fleiri ferðir váttað, er, at tann fíggjarligi parturin fylgir við hvørjari yvirtøku, sum verður framd. Tvs. at tað vit skulu gera er at yvirtaka og gjalda eitt tað vit kunnu sambart Heimastýrislógina. So eru nøkur ting eftir og tey koma uppí tann pakkan, sum liggur síðst í prosessini, nevniliga suverenitetin.

-Tað eru bert 10 mánaðir til val. Heldur tú tit røkka hesum áðrenn valið?

-Eg vóni vit fáa loyst nøkur av teimum málum, vit hava sett okkum. Eitt er púra givið, og tað er, at blokkurin skal til samráðingar nú, og ætlanin er so eisini at yvirtaka skúlamál og minka blokkin tilsvarandi. Tað skuldi borið væl til, tí tað skulu ikki samráðingar til tað.

-Hvussu við Búskapargrunninum, er hann lagdur á hillina?

-Nei avgjørt ikki. Hann er ikki ein partur í samráðingunum við donsku stjórnina. Lógin um hann kemur í tingið eftir ólavsøku. Vit høvdu hann á borðinum og ætlaðu at koyra hann niðan áðrenn, men vit høvdu ikki fingið ta neyðugu politisku viðgerðina frá hondini.

-Men um tit ikki kunnu koyra blokkpengar í grunnin, um olja ikki verður funnin við tað fyrsta og um gongdin í samfelagnum fer at minka um møguligt yvirskot, hvat skal tá í Búskapargrunnin?

-Hyggur man eftir, hvat blokkurin minkar við fyrsta árið, og hvat verður brúkt úr Búskapargrunninum, so líkjast tey tølini rættiliga nógv. So tað er ikki effektin tað fyrsta árið, sum er avgerandi fyri Búskapargrunnin. Tað er effektin tað 6.,7.,8.,10. og 15. árið, sum er avgerandi.

-Men um danir ikki vilja hava, at tit skulu koyra blokkin í Búskapargrunnin, so kunnu tit væl brúka hann til tey økini hann upprunaliga var ætlaður, og tað, sum so fer í Búskapargrunnin er tað yvirskotið, sum so verður á fíggjarlógini!

-Ja hví ikki júst tað! Tí dugi eg als ikki at síggja, at hetta er nakar trupulleiki. Tað, sum er avgerandi, er tað danski forsætisráðharrin sigur. Hann sigur nevniliga, at blokkurin er ætlaður til nøkur málsøki, og tað hevur verið grundarlagið alla tíðina síðani blokkurin kom. Vit minnast tá Jóannes Eidesgaard fór til Danmarkar sum landsstýrismaður í fíggjarmálum við eini útrokning av livistøðinum í Føroyum, sum var fullkomiliga avvíst frá danskari síðu, tí blokkur til Føroya hevði einki við livistøði at gera. Hann var markaður til nøkur málsøki.

Løgmaður vísir á, at Poul Nyrup Rasmussen herfyri hevði nøkur áhugaverd úttalilsi. Hann segði, at tað vóru tvey element í blokkinum. Annað var sambandi við nøkur málsøki, sambart Heimastýrislógina, sum vórðu yvirtikin. Og so var tað konjunkturjavnarin. Nær hevur blokkurin verið konjunkturjavnaður, og hvat hevði hent undir kreppuni, um blokkurin varð konjunkturjavnaðar - fór blokkurin upp tá spyr løgmaður og svarar, at tað gjørdi hann ikki. Tað hevur eingin regulering verið gjørd í blokkinum síðani hann kom í 1988 við undantaki av 1993, tá pensiónirnar eisini komu inn í hann. Hann er ikki konjunkturjavnaður men er beinleiðis relateraður til nøkur málsøki.

-Lat tað so vera so. Hann kemur eisini at minka eftir tí ferð vit yvirtaka nøkur málsøki sigur løgmaður í viðmerkingini.

gult13 cyan13 magenta13 svart13



# Alheimsgerðin skal ikki seta mannarættindini til viks

**Í júst útkomnu ársfrágreiðing síni boðar Amnesty International frá brotum á mannarættindini í 149 londum. Frágreiðingin kemur um somu tíð, sum 40 ár eru liðin, síðani Amnesty International varð stovnað.**

**Amnesty International**
*Tíðindaskriv*

Alheimsgerðin ella útbreiðslan av fríum marknaðarbúskapi og nýggjari tøkni, hava havt stóran búskaparligan vøkstur við sær, men skuld, fátækradømi og øktur ójavni eyðkenna eisini somu alheimsgerð. Í nógvum londum verður økta fátækradømi nýtt sum umbering fyri brot á mannarættindini. Tað gongur ikki, øll lond hava skyldu til at syrgja fyri, at mannarættindini hjá sínum borgarum ikki verða brotin.

28. mai varð Amnesty 40 ár, og føðingardagar geva okkum eitt gott høvi at lýta aftur á tey úrslit, sum eru fingin til høldar, men hetta høvi eigur eisini at verða nýtt til at hyggja at, hvussu heimurin er broyttur hesi árini. Í ársfrágreiðingini hjá Amnesty sæst, at tað ikki bara eru umboð fyri heimsins stjórnir, sum standa aftanfyri brot á mannarættindini.

Tá gjørt verður upp, sæst skjótt at vælvápnaðir hálvhernaðarligir mótstøðubólkar standa aftanfyri ein alsamt vaksandi part av mannarættindabrotunum. Og stjórnir gera mangan onki, tá privat fólk standa aftanfyri brotini. Hetta sæst t.d. tá talan er um ærudráp í familjum, ella tá talan er um umskering av smágentum.

Í ársfrágreiðingini verður víst á, at fólk verða tikin av døgum, uttan at málini hava verið tikin til dóms í 61 londum. Í 28 londum verður deyðarevsing nýtt sambært landsins lógum. Samvitskufangar sita fastir í minst 63 londum. Torturur ella onnur píning er fráboðað úr 125 londum, meðan „hvørvingar“ koma fyri í 30 londum. Veruligu tølini eru uttan iva nógva ferðir størri.

Hóast heimsins stjórnir á papírinum hava tikið mannarættindini til sín, so eru tær ikki nógvar, sum í veruleikanum halda mannarættindini. Í nógvum londum verða raðfestingarnar hjá fleiritjóða handilsfeløgum og trýst frá altjóða fíggjarstovnum nýtt sum vánalig grundgeving fyri, at stjórnirnar ikki klára at syrgja fyri, at mannarættindini hjá borgarunum verða hildin. Men flest allar stjórnir bæði kunnu og skulu gera nógv meir: Tær kunnu verja arbeiðarar ímóti ringastu misnýtsluni; tær kunnu fara í hernað ímóti ringastu korruptiónini, sum mangan hava við sær, at rættartrygdin er vánalig: tær kunnu syrgja fyri, at mannarættindabrot ikki sleppa at verða órevsaði, og tær kunnu halda uppat við at leggja eftir teimum, sum virka til frama fyri mannarættindini.

At vísa á, at stjórnir um allan heim hava skyldu at virða og verja mannarættindini hjá borgarum sínum, er enn sum áður høvuðsuppgávan hjá Amnesty. Er politiski viljin til staðar, hava stjórnirnar eisini valdið til at syrgja fyri, at mannarættindini verða hildin, líkamikið hvussu stórt trýstið uttaneftir er. Tí er ábygdin hjá stjórnunum framvegis í miðdeplinum.

Tey nýggju mannarættindamálini, sum stava frá alheimsgerðini, hava økt nógv um arbeiðið hjá Amnesty. Eitt dømi um hetta er arbeiðið, sum Amnesty í dag ger í handilsvinnuni. Har verður trýst lagt á fyritøkur, fyri at fáa tær at átaka sær størri leiklut tá mannarættindi skulu verjast. Serliga fyritøkur, sum arbeiða, har nógv mannarættindabrot verð framd, eiga at taka lut í arbeiðinum.

Í fjør heiti Amnesty serliga á altjóða gimsteinaframleiðarar og sølufyritøkur í eini roynd at syrgja fyri, at gimsteinar úr krígsherjaða Sierra Leone ikki komu á altjóða marknaðin. Amnestylimir mótmæltu uttanfyri gimsteinahandlar í USA, og aðrir limir luttøku í kjaki við Hoge Raad voor Diamant í Antwerpen og DeBeersbólkin, sum er heimsins størsta gimsteinafyritøka. Á sama hátt bað Amnesty altjóða oljufeløgini, sum hava áhugamál í Sudan, taka mannarættindaspurningin upp við sudanesisku stjórnina, og at syrgja fyri, at mannarættindini í øllum førum vóru hildin í teirra felagi.

Amnesty International hevur avdúkað, at altjóða handilin við amboðum, sum eru ætlaði til at geva elektriskt støð, er øktur øll 90'árini. Síðstu tvey árini hava í minsta lagi 150 fyritøkur í 22 londum framleitt slík vápn. Amnesty arbeiðir fyri at forboð verður sett ímóti at nýta løgreglu- og trygdarútgerð, sum í síni heild eru ræðulig, ómenninskjanslig og eyðmýkjandi.

Møguligi tvídrátturin ímillum stembanina eftir at vinna pening og stembanina at verja mannarættindini hevur havt við sær, at Amnesty hevur vent sær til Heimsbankan og aðrar altjóða fíggjarstovnar við sínum sjónarmiðum. Hetta er serliga gjørt, tí bankin hevur stóra ávirkan á, hvat verður sett á bæði politisku og tjóðarbúskaparligu dagskránna í teimum londunum, sum bankin samstarvar við. Hesum arbeiðinum fer Amnesty at halda fram við fyri at tryggja, at mannarættindini fáa ta høgu raðfestingina, sum tey natúrliga eiga hjá Heimsbankanum.

Síðani Amnesty varð stovnað fyri 40 árum síðani, er heimurin nógv broyttur. Tað eru málini, sum Amnesty arbeiðir fyri, sjálvandi eisini. Tað kann mangan tykjast, sum at mótstøðan ímóti mannarættindunum er øgilig, men tann uppreisturin ímóti hesum órættvísi, sum fyri 40 árum síðani hevði við sær, at Amnesty International varð sett á stovn, hevur framvegis við sær, at fólk í milliónatali halda fram við at leggja trýst á alheims stjórnir í strembanini eftir einum betri heimi fyri øll; utopia er ikki beint framman stavn, men tað eru broytingar rætta vegin.

# Føroya Myndakalendari komin





**Føroya Myndakalendari 2002 er nú at fáa til keyps í sølubúðunum. Eins og undanfarin ár er hann prýddur við sera vøkrum litmyndum**

*Eirikur Lindenskov*

Fyri 22. ferð er Føroya Myndakalendari hjá J. A. Arge at fáa í sølubúðunum, og aftur hesaferð mugu vit ásanna, at talan er um ein prýðiligan kalendara.

Litfagrar landslagsmyndir fangaðar av myndamanni við einum ótrúliga góðum eyga fyri slíkum.

Forsíðumyndin sýnir Mikladal á Kalsoynni – sum myndamaðurin hevur tikið av Kambi, fjallinum millum Mikladal og Djúpadal fyri norðin – ein penan dag.

Myndakalendarin er av sonnum ein fragd at skoða. Fleiri av myndunum eru vakrar loftsmyndir, ið úr erva - eisini úr fjøllunum, sýna okkum, hvussu vøkur føroyska náttúran er, bæði í summar- og vetrarbúna, eitt nú myndin, sum sýnir Múlan á Kalsoynni í kavabúna í januarmánaði, ella myndin av gomlu Havnini, Tinganesi við Eysturbýnum, nýggju býlingunum í Hoyvík og Eysturoynni í baksýni. Eyðkenda myndin av Tindhólmi, sum ferðamaðurin sær, tá hann kemur við flúgvara inn gjøgnum Sørvágsfjørð.

## Til føroyingar og ferðandi

Myndakalendarin er eitt framúrskarandi amboð hjá ferðavinnuni. Her verða Føroyar vístar úr vakrasta sjónarhorni, og tað er einki at ivast í, at fremmandafólk tekkjast landi okkara, tá tey síggja slíkar vakrar myndir.

Tað er tó ikki bara ferðafólkini, sum fáa gleði av kalendaranum. Nógvir føroyingar uttanlands hava kalendaran hangandi.

Men myndakalendarin verður eisini brúktur til annað. Á baksíðuni er sum vanligt ein rúgva av praktiskum upplýsingum um Føroyar, og tað skal sigast útgevaranum til rós, at teir brúka dagførdar upplýsingar. Teksturin er skrivaður bæði á enskum og donskum.

Eins og undanfarin ár er Føroya Myndakalendari 2001 prentaður í Íslandi. Prentþjónustan og Oddi í Reykjavík hava staðið fyri prentingini.

# Nevndin í FUT mannað

**Undirhaldstónleikarafelag**
*Tíðindaskriv*

Føroya Undirhaldstónleikarafelag - stytt FUT - hevði ársaðalfund í Skansastovu leygardagin 7. apríl. Tríggir nevndarlimir av fimm stóðu fyri vali, og í nevndina komu: Magnus Pauli Poulsen (afturvaldur), Jón Tyril og Hjalmar Holm. Í nevndini sita eisini Kaj Johannesen og Torbjørn Lisberg.



Fut hevði fyri tíð síðani aðalfund, har nevndarval var á skránni og eisini vóru fleiri nýggj hugskot á lofti, til nevndina at arbeiða við

Mynd: Dagfinn Olsen

Til viðgerðar vóru fíggjarstøða felagsins, samstarv við líknandi feløg í hinum norðurlondunum, umstøðurnar til tónleikavirksemi kring landið og føroyskur tónleikur á útlendskum palli.

Endamálið hjá FUT er at fremja áhugamál limanna innan tónleik, og framtíðarætlanir felagsins eru m.a. at viðgera rytmiskan tónleik sum mentamál, so tónleikur kann gerast ein veruligur valmøguleiki í mun til til annað mentantar- og frítíðarvirksemi kring landi. Hesin tørvur er partvís nøktaður við tónleikaundirvísing í skúlum, men FUT ásannar, at umstøðurnar at spæla, venja og framføra tónleik langt frá eru nøktandi fyri tey, ið hava tónleik sum áhuga.

FUT arbeiðir eisini við at leggja ein heimasíðu út á alnótina. Ætlanin er at hon verður eitt framtíðarforum hjá limunum, tónleikaáhuganum og -fyrireikarum innan sum uttanlands.

Men fyrst og fremst er ætlanin at skipa felagið í enn fastari rammur, so felagið saman við landsins tónleikarum kunnu byrja at fremja mál, ið muna tónleikinum og umstøðum hansara kring landi.